# Ítróttur

e-mail: jakup@sosialurin.fo
Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

Lesið eisini ÍtróttaSosialin á alnetinum: www.sosialurin.fo

# B36 skal reisa seg

*Fyrsti setningurin hjá B36 leikarunum má verða at vaska stórtapið í Gladsaxe av sær*



*Vit skulu prógva, at talan var um ein svipsara í útidystinum móti AB, sigur B36 liðskiparin, Jens Kristian Hansen. Hann og liðfelagarnir ætla at skapa ein góðan dyst á Tórsvølli í kvøld*

JÁKUP MØRK

Tá B36 fyri tveimum vikum síðani stóð framman fyri stórari avbjóðing ímóti akademikarunum úr AB, mundu vónirnar fyri einum líkinda úrslitið vera hampuliga góðar.

Árstalsfelagið hevur áður fingið góð úrslit á útivølli, og vónirnar um eina endurtøku av einum heiðurligum úrslitið vóru so avgjørt til staðar undan dystinum.

### Vaska sær

90 minuttir og átta mál seinni lógu allar hesar vónir tó í skeljasori. B36 varð spælt fullkomuliga út av vøllinum móti bólttryggu AB-leikarunum, og allur spenningur um samanlagda vinnaran av uppgerðini var beindur burtur, langt áðrenn hon veruliga var liðug.

Tað verður heldur ikki víðari luttøku fyri eygað, at B36 leikararnir í dag fara á Tórsvøll at gera returdystin móti AB av sær.

- Fyrst og fremst mugu vit royna at vaska stórtapið frá fyrra dystinum av okkum. Tað krevur ein góðan innsats frá okkara síðu, men tað skulu vit gera. Eisini fyri føroyskan fótbólt er týdningarmikið at prógva, at talan var um ein svipsara í Gladsaxe.

Orðini eigur liðskiparin hjá B36, Jens Kristian Hansen. Umframt at vera B36 leikarin við drúgvastu royndunum á landsliðnum, er hann eisini tann av B36 leikarunum, sum hevur flestar royndir í europeiskum høpi.

Dysturin í kvøld verður 12. altjóða uppgáva felagsins, og Jens Kristian hevur verið við í hvørjum einasta minutti av teimum undanfarnu 11. Sostatt fer hann, um alt gongst eftir vild, at runda teir 1.000 minuttirnar tíðliga í fyrra hálvleiki.

### Royna frameftir

Jens Kristian leggur annars dent á, at teir hava ongar ætlanir um at grava seg niður í egnum brotsteigi í kvøld: - vit mugu royna at skapa nakað fram eftir vøllinum, soleiðis at talan verður um ein góðan dyst, har áskoðararnir eisini fáa nakað fyri pengarnar, heldur liðskiparin.

Júst í framrættaða spælinum er B36 liðið annars nakað skert í hesum døgum. Ronnie Samuelsen, sum varð skaddur á danmarkarferðini, verður ikki tøkur restina av árinum, og allarhelst er tað sama galdandi fyri Bjarna Prior. Har umframt er Jákup á Borg í løtuni staddur í Danmark í útbúgvingarørindum, so heldur ikki hann er tøkur hjá venjaranum, Pelle Andersson.

### Taka sær av løttum

Møguleikarnir fyri einum heiðurligum úrslitið hjá B36 áttu so avgjørt eisini at verið til staðar í kvøld.

Úr AB ljóðar, at teir ætla at nýta føroyaferðina sum eitt kærkomið høvi at taka tað eitt sindur róligt.

At teir hava tryggjað sær atgongd til næsta umfar eru teir ikki í iva um, og sum skilst kann roknast við, at fleiri eykaleikarar fáa møguleikan í kvøld, meðan landsliðsleikarar felagsins fáa høvi at hvíla seg.

Hinvegin kann hetta eisini gera møguleikarnir hjá B36 verri, tí nýggju leikararnir hava allarhelst okkur at prógva fyri venjaranum.

B36 liðskiparin er í øllum førum ikki í iva um, at mótstøðuliðið fer at gera sítt besta:

- Teir skulu nokk pressa, tað sum teir eru mentir, og so er tað bara upp til okkum at gera tað sama. Talan verður so undir umstøðum um eina endurtøku av fyrra dystinum.

# FCK styrkir um hópin

*Donsku bløðini skriva í dag, at høvuðsstaðarfelagið skal hava nýggjan málverja*

JÁKUP MØRK

FC København, sum millum annað hevur føroyska Toda Jónsson i hópinum, hevur als ikki fingið nakra sannførandi byrjan upp á nýggja kappingarárið.

Við kappingarbyrjan varð annars roknað við, at FCK so avgjørt fór at teljast millum heitastu evnini til DM gullilð. Ikki tí, leikarahópurin var ikki broyttur so nógv í mun til undanfarna ár, men á beinkinum hevði felagið fingið eitt navn av teimum heilt stóru, og tey flestu væntaðu, at enski Roy Hodgson veruliga skuldi seta ferð á stigainnsavnanina.

### Avgjørt á vøllinum

Nú er tað tó soleiðis, at fótbóltsdystir verða avgjørdir úti á vøllinum, og eftir at venjarin hevur sent leikarar sínar hagar, er ikki so øgiliga nógv, sum venjarin sjálvur kann gera. Heldur ikki um navnið er Roy Hodgson, og úrslitini hjá FCK hava verið lítið frægari higartil í ár, enn tey vóru í fjør.

Fyrsta dystin vunnu teir sannførandi, men síðani kom ein javnleikur og trý tap, og hetta er eingin í felagnum nøgdur við. Spælið hevur tó ikki verið av eini leið, men málini hava væntað í ólukkumát.

Tí varð fyri fáum vikum síðani gjørd avtala við svenska áleyparan, Pascal Simpson, men heldur ikki hann hevur fingið hol á, hóast tað eitt nú móti FC Midtjylland ikki skortaði upp á møguleikar.

### Fáa nú málverja

Venjarin hevur nú vent eyguni móti øvugta endanum av vøllinum, har tað heldur ikki hevur staðið so væl til.

Ungi Rune Pedersen hevur teir báðar seinastu dystirnar vart málið fyri Michael Steensgaard, men eru tíðindini úr Ekstra Bladet eftirfarandi, verður avtala í næstum gjørd um at keypa eykamálverjan hjá Dundee United. Kanadiumannin, Alan Combe. Hesin kom til skotska premier league felagið fyri einum ári síðani, men hevur millum lítið og einki spælt.

Úr Skotlandi fréttist, at venjarin hjá Dundee, Alex Smith, ikki avsannar tosið um málverjan, og tí verður roknað fyri vist, at avtalan fer at gerast veruleiki.

Umframt nýggjan málverja, hevur FCK eisini vent eyguni móti fyrrverandi landsliðsleikaranum, Jacob Laursen, sum seinastu árini hevur roynt seg hjá Derby í bestu ensku deildini.

Laursen, sum í fjør var liðskipari hjá Derby, hevur í summar sagt leiðsluni frá, at hann fegin vil heim aftur til Danmarkar, og tískil hevur venjarin gjørt av, als ikki at nýta hann í ár.

### AGF fær brasiliumann

Eisini AGF, har Óli Johannesen telist millum leikararnar, hevur styrkt sær um hópin.

BT skrivaði í gjár, at brasiliumaðurin, Richardo Boirdeiro Silva, sum seinastu vikuna hevur vant við felagnum, verður í hópinum hjá AGF fram til vetrarsteðgin.

Í fyrstu atløgu er talan um leigusáttmála, men eru partarnir nøgdir um samstarvið, verður henda møguliga broytt til ein varandi sáttmála.

Richardo er áleypari, og í fjør skeyt hann 18 mál í 22 dystin fyri brasilska felag sítt, Gols. Einki stendur tó at lesa um, á hvørjum støði hetta felag spælir.



# GÍ ætlar at betra um úrslitið

*Hóast teir stóðu seg væl í fyrra dystinum móti IFK Norrkøping, so meta gøtumenn, at teir kunnu røkka einum betri úrslitið í kvøld enn fyri tveimum vikum síðani*



*Gøtumenn stóðu seg væl, tá teir fyri fjúrtan døgum síðani vóru vertir fyri svenska IFK Norrkøping. Stendur til teirra sjálvar, verður talan í øllum førum ikki um eitt verii úrslit hesaferð*

JÁKUP MØRK

Besta føroyska avrikinum í europeiskum høpi higartil í ár hevur GÍ staðið fyri.

Hóast tað í tølum ikki var betri enn tað, sum KÍ megnaði á útivølli móti Reyðu Stjørnu, so var talan tó um ein heilt øðrvísi dyst. Hetta var nevnliga als ikki ein av teimum dystum, har tú alla tíðina hevði varhugan av, at útlendska mótstøðuliðið alla tíðina hevði nakað at geva av, soleiðis at teir sjálvir avgjørdur, hvussu leikur fór fram.

Burtur sæð frá fyrsta kortérinum á Tórsvølli, vóru gøtumenn hinvegin væl við í dystinum, og í einum tveimum førum var tað bert svartasta óhapp, sum forðaði teimum í at skora.

### Sami setningur

Setningurin undan fyrra dystinum var í fyrstu atløgu at forða mótstøðumonnunum í at leggja seg fram um beinanvegin, fyri síðani at royna at ota seg longur niðan á vøllin.

Beinan vegin eftir fyrra dystin segði liðskiparin hjá GÍ, Magni Jarnskor, at setningurin í Svøríki fór at vera júst hin sami, og einki bendir á, at hesar ætlanir eru broyttar.

Til at røkka hesum máli hevur GÍ venjarin, Johann Nielsen so at siga allar mans tøkar. Rúni Justinussen breyt beinið í heimadystinum móti svenska liðnum og verður ikki við tað, sum eftir eftir er av kappingarárinum, men annars eru allir mans tøkir til dystin í kvøld.

### Ikki verri

Í gjár fingu vit fatur á einum av meira royndu gøtumonnunum, Henning Jarnskor, og sum heild lat hann sera væl at ferðini higartil.

Gøtumenninir høvdu tá júst verið og vant eina løtu, og bæði venjingarumstøður og veður vóru av tí allarbesta.

Lagið í hópinum var eisini gott, og vónirnar fyri einum líkinda úrslitið vóru heldur ikki verri.

Spurdur um úrslitið í kvøld, segði yngsti Jarnskor maðurin, at tað sum so var eitt sindur torført at gita um sjálvt úrslitið. Hann legði tó afturat, at teir so avgjørt ikki ætlaðu, at talan skuldi gerast um eitt verri úrslit enn 2-0 tapið á Tórsvølli:

- Ta ferðina haldi eg at vit vóru heldur óhepnir, tá tað ráddi um at skjóta mál, meðan spælið annars var á eini góðari leið. Megna vit at vera eins væl skipaðir í verjupartinum, verður tað sera torført hjá teimum at koma ígjøgnum verju okkara, og so kann tað vera, at vit fáa skapt okkurt hinvegin. Vónandi verður hetta nóg mikið til at betra um úrslitið, og møguliga til at skapa ein javnleik, heldur Henning Jarnskor.

### Óbroytt spælietlan

At gøtumenn ætla sær at vera væl skipaðir í verjupartinum merkir tó sambært landsliðsleikaranum, at talan verður um eina serstakliga verjukenda útgávu av GÍ:

- Vit spæla nokk við somu uppstilling, sum vit hava gjørt higartil í ár. T.v.s. við einum manni heilt frammi og so tveimum hangandi áleyparum. Verjan verður allarhelst eisini hin sama, so eg haldi ikki, at talan verður um nakað serstakliga verjukent útgangsstøði, heldur hann.

At enda vísir hann á, at teir ætla sær at vera við til at skapa ein góðan dyst, og so er bert at vóna, at hetta eisini røkkur til eitt gott úrslit hjá gøtumonnum, sum í kvøld fara undir sína 14. altjóða uppgávu.

# Brøndby úti

*Tað verður neyvan nakað danskt umboð í UEFA Champions League hetta kappingarárið*

JÁKUP MØRK

Longu undan dystinum á Volkspark Stadion vóru donsku vónirnar fyri framhaldandi luttøku í meistarakappingini ógvuliga lítlar.

Silvurvinnararnir frá í fjør, Brøndby, høvdu tapt heimadystin móti Hamburger SV við tveimum málum móti ongum, og øll vistu, at hetta fór at verða sera tungt at vinna aftur.

Vónin bygdi tó á, at Brøndby, sum hevði allar møguleikar at vinna fyrsta dystin, veruliga tykist hava fingið ferð á í heimligu kappingini, og so høvdu danir heldur ikki gloymt útidystin móti Karsruhe fyri nøkrum árum síðani. Ta ferðina vendi Brøndby einum 3-1 tapi á heimavølli við at banka týska liðið sundur og saman.

### Eingin endurtøka

Talan gjørdist tó ongantíð um nakra endurtøku av hesum úrsliti í Hamburg.

Heimaliðið, sum var rættuliga verjukent, megnaði at halda tætt allar 90 minuttirnar, hóast teir í einum føri fingu góða hjálp frá linjuverjanum.

Hetta var tó einasti veruligi møguleiki, sum danska liðið hevði í dystinum, so samanumtikið mundi tað vera á eini leið, at javnleikur gjørdist úrslitið. Hamburger kom sostatt víðari við samanlagt 2-0.

Seinasta danska vónin á hesum sinni er sostatt Herfølge, men eisini her sær svart út. Herfølge skuldi i gjárkvøldi royna seg á útivølli móti skotska stórfelagnum, Glasgow Rangers, sum í fyrra dystinum sera sannførandi vann 3-0.

Heilt burtur úr europeiskum høpi eru tey bæði donsku liðini tó ikki. Tey liðini, sum verðautsligin í triðja undankappingarumfarinum sleppa nevnliga eisini at royna seg í UEFA Cup kappingini.

Úrslitini av dystunum týskvøldið vóru annars hesi:
Slavia Prag-Shaktar Donetsk 0-2 (1-2 samanlagt)
Hamburger SV-Brøndby 0-0 (2-0 samanlagt)
Dinamo Zagreb-AC Milan 0-3 (1-6 samanlagt)
Galatasary-St. Gallen 2-2 (3-2 samanlagt)

Móttøka í Havnar Klubba

Í sambandi við, at
Anne Petersen hevur sín
síðsta arbeiðsdag eftir
44 árum, bjóðar
Føroya Bjór til móttøku fyri
viðskiftafólki og øðrum í
Havnar Klubba

fríggjadagin 1. september
frá 16.00 til 20.00.

Föroya Bjór
700 Klaksvík
Tel 45 54 54, Fax 45 60 52

